# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

## Sosialurin á ferð

### BILLUND – barnabýur burturav

Í góðveðrinum á hvítusunnu var Sosialurin fimm dagar í Billund, har vit við barnabrillum og foreldraeygum upplivdu heimskenda legobýin. Fyrstu dagarnar gistu vit á Hotel Legoland og seinni á Hotel Propellen, sum er beint við. Heimanífrá leigaðu vit bil frá 62° N, sum stóð klárur á flogvøllinum í Billund. Ein dag koyrdu vit 20 minuttir norðureftir til Givskud Zoo, og ein annan dag tveir tímar suðureftir til Danfoss Universe á oynni Als. Men alt hetta kunnu tit lesa meira um hesa vikuna í Summarkappingini, har leiðin gongur til Billund.

# Legoland



Fyrstu tveir dagarnar vóru vit á vitjan í Legoland. Legoland hevur ment seg sera nógv síðstu árini, so parkin í dag verður mett sum ein av fremstu ferðamálunum Norðureuropa.

Í ár eru heilir fimm nýggir aktivitetir – hvør vátari og villari enn annar. Vit blivu dýggjvát í nýggja *Pirate Splash Battle,* har familjurnar fáa hvør sín bát og herja á í vatnbardaga hvørjar móti øðrum – og ímóti áskoðarum á landi! Tíbetur tornaðu vit aftur skjótt í heitu summarsólini.

**Kostnaður:**
**Børn 0-2 ár ókeypis**
**Børn 3-12 ár 219 kr.**
**Vaksin 249 kr.**

**15 matstovur eru í Legoland, umframt ein ørgrynna av kioskum og sølubúðum. Eisini eru borð og benkur allastaðni, so fólk sjálvi kunnu taka mat og drekka við. Og so fæst hin fantastiski italski ísurin ☺**

### Hotel Legoland

Vit búðu á Hotel Legoland,sum hevur fýra stjørnur og liggur mitt í parkini. Hotellið er fyrstafloks, og alt er innrættað við børnunum fyri eygað. Í hvørjum horni eru smá spæliøki við Lego-kubbum og sjónvarpsspølum, og børnini kunnu renna runt sum teimum lystir. Kamarið finna tey lættliga aftur, tí alt er uppmerkt við kendum legofigurum.

Allastaðni hanga og standa stórar legostandmyndir, og sjálvt seingjarklæðini eru prýdd við legomynstri. Uttanfyri er stórt spælipláss, og hvønn dag verður skipað fyri kappingum og undirhaldi fyri børnum. Eisini eru fín matstova og barr á hotellinum.

Hotel Legoland er eisini best umtókta skeiðs- og fundartaðið í Danmark. Hetta kemst helst av, at kreativiteturin handan Lego-hugtakið hóskar væl til nýskapandi hugtøk sum innovatión og team-building hjá virkjum og fyritøkum.



**Legoland er bygt av 50 milliónum Lego-kubbum. Har eru fleiri enn 50 aktivitetir, og opið er frá tíðliga á vári til langt út á heystið**



Heimasíða:
www.legoland.dk og
www.hotel-legoland.dk

***Ein partur av Hotel Legoland er nýliga umvældur til serlig barnakømur við eitt nú prinsessu- og riddaratema. Hesi kømur hava útsýni beint út í Legoland-parkina***

## Puntur nr. 21







Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari